# Albert: Gudsonur Egils

**Egil náddi ikki so nógv í sínum stutta lívi. Men hann gjørdist so gubbi, og hetta gav honum nógva gleði. Vit hava eina frásøgn um gudsonin, Albert hjá Søren á Krákusteini. Hon er grundað á grein í bókarøðini hjá Niels Juel Arge: Teir sigldu úti**

Albert fór til skips 16 ára gamal við Sámali í Hvannasundi við sluppini Grundick. Hann hevði ætlað sær á skiparaskúla, men so hendi tað eitt árið, at kokkurin legðist sjúkur. Tá fór Albert at kokkast.

Um heystið bjóðaði Sámal honum at fara á skeið hjá Palla Bager at læra at baka, so hann var betri førur fyri at kokkast, og Sámal bjóðaði sær at gjalda kostnaðin. Hesum tilboði tók Albert av, og hann varð við Sámali fimm ár afturat.

Síðan for Albert sum messudrongur við Isafold hjá Skipafelagnum við Conrad Skaale sum kokki. Teir fóru í farmasigling, og tá kom Albert fyrstu ferð rættuliga uttanlands.

Aftaná fór Albert við Mortan á Argjum, sum undir krígnum fórst við Nýggjaberg, við einum av teimum italiensku trolarunum, sum veiddu í Barentshavinum, og sum fyri ein stóran part vóru mannaðir av føroyingum. Her var hann í níggju mánaðir.

## Fer niður á kokkaskúla

Eina ferð Albert lossar umborð á Tjaldrinum kemur hann á tal við hovmeistaran Effe Mohr, sum Egil annars hitti í Danmark í 1917. Effe bjóðaði Albert at útvega honum læruplass sum kokkur. Hetta gjørdist á tí tá nýggja hotel Astoria í Keypmannahavn.

Í 1938 giftist Albert við Valborg úr Kaldbak.

Táið heimsbardagin brast á í 1939, var ringt at fáa nakað at gera á landi í Føroyum. Tá fekk Albert starv sum kokkur við DFDS damparanum Gorm. Leiðin gekk til USA, men fyrst skuldi leggjast at í Kirkwall í Orknoyggjunum til kanningar av farminum. Hetta tók nógvar dagar.

Eisini skuldi leggjast at í Kirkwall á veg heim aftur. Hetta tók aftur sína tíð. Tá ið teir komu í Kattegatt, rendu teir seg fastar í ís og máttu bíða í seks samdøgur eftir ísbrótara. Ferðin úr New York til Keypmannahavnar tók tílskil 32 samdøgur í staðin fyri teir ætlaðu 12 dagarnar.

Teir fóru so til Antwerpen í Belgia eftir maskinlutum til Danmarkar. Lastin var full, og 9. apríl vóru teir klárir at sigla til Danmarkar. Tá fingu teir boð um, at teir sluppu ongan veg. Danmark var nú hersett av týskarum, og landið var tí roknað fyri at vera fíggindaland. Tað sama var við skipinum og manningini. Teir fingu tó loyvi til at fara í land.

Ein dag kom fólk frá belgiska herskipaflotanum umborð og strikaðu Dannebrog, og teir settu belgiska flaggið í staðin. Nú vóru teir undir belgiskum ræði. Teir fóru so úr Antwerpen við ellivu belgiskum sjóhermonnum at ansa eftir teimum.

## Komu í fangalegu

Kós varð nú sett móti Onglandi, men á vegnum verða teir torpederaðir, og skipið søkkur. Teir verða bjargaðir, og teir enda aftur í Belgien.

Nú verða teir fluttir til eina hermannalegu stutt frá franska markinum. Hiðani vórðu teir saman við 3.000 øðrum monnum sendir víðari í góðsvognum til eina legu sunnan fyri Paris. Aftur seinni vóru teir sendir í gomlum lasaførum til eina legu við Miðalhavið.

Her komu teir til eina gamla flóttafólkalegu, sum var í sori. Men teir funnu smíðiamboð, so teir kundu byggja sær so fræga lon, at teir ikki svóvu undir opnum himli.

Aftaná tríggjar mánaðir sluppu teir haðani, og hetta høvdu verið ringir dagar í Fraklandi. Teir flestu vóru sjúkir og ússaligir av ringari røkt. Hitin og flugan plágaði illa, og nátthúsini vóru út av lagi ótespulig. Tað var strangt vaktarhald, og tann sum royndi at rýma varð skotin.

Bert bastilludagin 14.juli skuldu øll eftir franskari siðvenju hava tað gott. Teir fingu góðan mat og so nógv vín, at teir flestu duttu av.

Í barakkini hjá Albert vóru 57 mans. Fimm vóru prestar, so andaliga var eingin neyð. Prestarnir vóru eisini sera hjálpsamir, sum tá Albert vildi skriva konuni bræv.

## Rópti Heil Hitler fyri at fáa tubakk

Men so gav Frakland seg yvir til týskararnar, og nú vóru teir ikki longur fíggindar men sameindir. Nú skipaðu týskarar fyri, at teir skuldu leyslatast og sleppa heim til Danmarkar. Fyrst fóru teir til Geneve í Schweits. Her hitti Albert tilvildarliga føroyingarnar Frimodt Rasmussen úr Klaksvík og Óla Rasmussen úr Fugloy. Teir vóru allir farnir avstað við hvør sínum skipi, og nú hittust teir í Geneve við ongum skipi.

Ferðin gekk nú til Berlin, har teir máttu steðga í tvey samdøgur. Her fekk Albert tubakksneyð. Táið hann fór inn í ein handil at biðja um tubakk, varð honum ikki ønt aftur. Tá ansaði hann eftir, at tá fólk kom í handilin at keypa, klamsaðu tey hælarnar saman og róptu "Heil Hitler." At enda stóð so nógv á Albert, at hann gjørdi tað sama. Fór inn í ein handil, rópti Heil Hitler og bað um tubbak. Tá bar til! Albert leggur tó dent á, at Hitlers maður gjørdist hann ongantíð.

## Aftur til Danmarkar og síðan til Føroya

Aftaná tveir dagar komu teir so till Keypmannahavnar við toki. Kona Albert var tá stødd í Esbjerg, har beiggi hennara búði. Hon hevði fingið at vita, at Albert var burturgingin. Men Albert var eisini tá likamliga niður undirkomin. Hann vigaði ikki meira enn 96 pund.

Til Føroyar slapst so ikki, meðan kríggið var. Men ein dagin fær Albert bræv frá Poul Niclassen landstingsmanni, at hann kundi fáa starv við eini fergu, og fór hann við har sum kokkur, til kríggið var av. Hann fór tá at sigla við DFDS, men fekk so arbeiði á landi hjá Svanemølleelverkinum.

Í 1947 fluttu tey heimaftur. Verforeldrini í Kaldbak vóru farin at eldast, so tey fluttu hagar.

Tey fyrstu árini sigldi Albert við fiskiskipum. Hann var eisini í Føroyingahavnini, men fekk skaða í hondina og noyddist heim. Nú fekk Albert arbeiði í Mjørkadali við vegaarbeiðinum, sum tá var. Í trý ár frá 1959 var hann her sum arbeiðsmaður, men tá ið farast skuldi undir at byggja radarstøðina í 1962, vóru boð eftir Alberti at vera kokkur. Hann tók av og arbeiddi har í nítjan ár, tá ið hann legði frá sær fyri aldur.

Tað var sum áður greitt frá Albert, sum arvaði dagbókina hjá Egil Djurhuus, sum er grundarlagið fyri hesi greinarøð. Albert doyði í 1994.

**Komandi partur**

Í komandi parti koma vit til 1918, sum er seinasta ár, Egil er á lívi. Nú verður hann umvendur og hevur vitnisburð í blaðnum Naade og Sandhed



*Albert Sørensen sum ungur maður undan krígnum*



*Albert var gudsonur Egil*



*Albert flutti heim aftur í 1947. Hann gjørdist kokkur í Mjørkadali*

Sosialurin